## Politiken leyp framav

Danska blaðið Politiken gjørdi eftir øllum at døma ov nógv av, tá tað í gjár skrivaði, at ríkisveitingin til Grønlands fer í søguna um fimm ár. Í greinini endurgevur blaðið stjóran í Ráevnisstýrinum, Jørn Skov Nielsen, at eydnast tað oljufelagnum Cairn at finna olju við Vesturgrønland, kann framleiðslan byrja um fimm ár. Men hetta hevur Politiken eftir øllum at døma yvirtulkað. Jørn Skov Nielsen sendi tí út eitt tíðindaskriv í gjár, har hann gjørdi greitt, at tað fer at meiri enn fimm ár, áðrenn oljuinntøkurnar kunnu avloysa blokkin.




## Lata tilboð upp á strandfaraskip upp hósdagin

Innkomnu tilboðini uppá umbyggingarnar av Ternuni og Rituni vera alment latin upp á skrivstovuni hjá SSL, hósdagin. Strandferðslan sigur, at áhugin fyri at bjóða upp á arbeiðið hevur verið stórur. - Væntandi verður farið undir arbeiðið upp á Ternuna, so skjótt avgjørt er, hvør fær arbeiðið. Arbeiðið upp á Ternuna verður væntandi liðugt fyrst í mars, og fyrst í juni verður arbeiðið upp á Rituna væntandi liðugt.



*Tórbjørn Jacobsen vil hava málið um MVG'ið og TAKS í Fíggjarnevndina og fáa Jóannes Eidesgaard at greiða frá, hvussu hann ætlar at tryggja, at øll, sum eru partur av málinum, fáa eina rættvísa viðgerð*

*Savnsmynd*

MVG-Málið:

# Vil hava Jóannes til forhoyr

**Størsti andstøðuflokkurin, Tjóðveldi, vil hava Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í fíggjarmálum, til samráð í Fíggjarnevndini. –Vit vilja hava at vita hvussu Jóannes Eidesaard ætlar at tryggja, at øll – eisini tey sum einki hava fingið aftur – verða rættvíst viðfarin, sigur Tórbjørn Jacobsen, næstformaður**

MVG-MÁLIÐ
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Meðan málið um meirvirðisgjaldið av skrásetingargjaldinum á nýkeyptum akførum í árunum 1999 til 28.apríl 2005 hevur verið í hæddini síðan dómur fall í Føroya Rætti tann 23.desember, hevur politiska andstøðan verið kúrr. Rættiliga kúrr. Einasta undantakið er Kári á Rógvi, sum hevur verið frammi við sínari greiðu meining, men kanska líka nógv sum doktari í jura, sum løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin.

Henda tøgnin hevur helst fingið mong at undrast, hvat er á vási, tá andstøðan vanliga er tilreiðar at garta upp, so skjótt møguleiki býðst fyri tí.

Men umsíðir tykist tó okkurt fara at henda. Formaðurin í Tjóðveldi, Høgni Hoydal, váttar, at tey í Tjóðveldi sótu á fundi saman í gjár og vendu málinum, og viðgjørdu støðuna, sum er íkomin eftir at Føroya Rætt-ur hevur avsagt sín dóm.

- Spurningurin nú er um, hvussu landsstýrismaðurin kann tryggja, at borgarin fær eina rættvísa viðgerð. Vit kunnu sum so ikki gera nakað í Tinginum við at lóggeva og so framvegis, tí hetta er eitt mál hjá umsitingarliga valdinum, sigur Høgni Hoydal.

### Í samráð í Fíggjarnevndini

Høgni Hoydal greiðir frá, at orsøkin til tøgnina er ikki tann, at tey eru bangin fyri at blanda seg upp í málið.

- Nei, vit sótu á fundi í gjár og viðgjørdu málið, nær málið kom fyri Tingið og hvar málið varð byrjað, og so framvegis, og ætlanin er nú at taka málið upp í Fíggjarnevndini, sigur hann.

Næstformaðurin í Tjóðveldi, Tórbjørn Jacobsen, er limur í fíggjarnevndini. Tórbjørn váttar, at hann í dag arbeiðir við einum skrivi til fíggjarnevndarformannin, Anfinn Kallsberg, har hann fer at heita á hann um at taka hetta málið upp til viðgerð í Fíggjarnevndini og har at fáa kallað Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í Fíggjarmálum, inn til samráð.

### Á djúpum vatni

Tórbjørn Jacobsen greiðir, eins og formaðurin, frá, at tað mest umráandi, og tað, sum málið í veruleikanum snýr seg um nú er, hvussu allir borgarar verða stillaðir líka fyri lógini.

- Vit vilja brúka hetta samráðið til at finna útav, hvussu Jóannes Eidesgaard ætlar at gera fyri at tryggja, at øll tey, sum eru partur av málinum – og ikki bara tey fáu sum høvdu tíð og orku at stevna TAKS – kunnu fáa eina rættvísa viðgerð, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Høgni Hoydal sigur, at Løgtingið hevur ikki nógv kort at spæla uppá í hesum málinum, og tað er umráðandi at vita, hvønn veg málið vendur.

- Tað er lætt at spæla populist, og stilla seg at buldra í Tinginum, men tað er øgiliga lítið vit fáa gjørt í Tinginum. Nú er tað umsitingarliga valdið – landsstýrið - sum kann gera nakað, og kann tryggja, at umsitið verður á rættan hátt, sigur Høgni Hoydal.

Tórbjørn Jacobsen heldur, at málið tó er eitt sindur løgið.

- Eg haldi at Jóannes Eidesgaard er á ótrúliga djúpum vatni, tá hann kategoriskt situr og verjir seg móti einum dómi, sum er avsagdur í Føroya Rætti, sigur Tórbjørn Jacobsen.